## Great Greenland fær stuðul

Fíggjarnevndin hjá grønlendska Landstinginum hevur samtykt at játta kópaskinnafyritøkuni Great Greenland átta milliónir krónur í rakstrarstuðuli. Játtanin kom, eftir at Great Greenland í síðstu viku boðaði frá, at fyritøkan hevði næstan ongar pengar eftir at lata veiðimonnunum, sum avreiða kópaskinn. Fíggjarnevndin leggur tó ta treyt við játtanini, at í framtíðini skal Great Greenland kunna landsstýrið um fíggjarstøðu felagsins minst eina ferð um árið. Harafturat mælir nevndin fyritøkuni til at taka veiðimannafelagið KNAPK við upp á ráð, tá týðandi avgerðir skulu takast.



# Niðurgongdin er neyðug



*Neyvan kreppu, men munandi minni virksemi, er nakað, sum føroyska byggivinnan skal brynja seg til tey næstu tvey árini, heldur stjórin í Havnar Timburhandli, Heini Fosaa*
*Mynd: Jens Kristin Vang*

**Eftir trý feit ár eru eini tvey rak ár í væntu fyri føroysku byggivinnuni, heldur stjórin í Havnar Timburhandli. Og kanska er tað jaligt við eitt sindur av mótburði, tí hákonjukturin seinastu árini hevur trýst prísleguna alt ov høgt upp, heldur hann**

BYGGIVINNAN
*Edmund Jacobsen*
*edmund@pressecentrum.dk*

Minkandi íløguhugur og fallandi byggivirksemi. Soleiðis eru útlitini fyri føroysku byggivinnuna beint nú sambært Heina Fosaa, stjóra í Havnar Timburhandli.

Men hóast hann er alt annað enn fegin um útlitini, so er hann sannførdur um, at niðurgangstíðirnar eru neyðugar. At fallandi virksemi kemur nú er kanska mest av øllum av tí góða, heldur hann:

- Vit hava havt ein hákonjuktur, sum vit ongantíð hava sæð áður. Tað hevur verið púra vilt! Til dømis hava vit verið noyddir til at leggja kvotur á byggitilfarið - eftirspurningurin hevur heilt einfalt verið so nógvar ferðir størri enn útboðið. So eg haldi ikki, at vit skulu verða kedd um, at virksemi minkar. Tað er ein neyðug gongd aftan á tað rokið, vit hava sæð seinastu trý til fýra árini, sigur Heini Fosaa.

### Fallandi prísir stimbra

Hinvegin væntar Heini Fosaa ikki, at vit fara at uppliva eina veruliga kreppu innan fyri byggivinnuna.

- Vit hava jú ikki pengamangul í Føroyum. Flestu fyritøkurnar hava framhaldandi eitt positivt cashflow. Vit vænta, at vanligt viðlíkahald fer framvegis at verða á skránni, og at tað almenna eisini fer at hava onkrar verkætlanir. Men tað er heilt vist, at tað ovurstóra virksemi, sum vit hava sæð seinastu árini, tað fer at støðga upp tey næstu tvey árini, sigur Heini Fosaa.

Hann leggur afturat, at bremsilongdin hjá byggivinnuni er long. Tær verkætlanir, sum hava fingið fígging, halda fram, og at tað tískil væntandi verður fitt av virksemi til einaferð í 2009.

Har eru eisini fleiri viðurskifti, ið gera, at niðurgongdin í byggivinnuni ikki verður so ógvuslig, sum fleiri vænta.

- Beint nú eru fólk bangin. Vit hava øll fingið ein hvøkk av, at fíggjarstøðan kann venda so skjótt. Tann hækkaða rentan ger, at tað er torførari at fíggja byggiverkætlanir. Men hinvegin